

MYND: EYÐBJØRN JACOBSEN

*Teir hava verið kallaðir ein søkkandi skúta við pillrotnari last, men teir hava yvirlivað tær lemjandi atfinningarnar ímóti bólkinum – og nú hevur bólkur givið út live-fløgu og dvd-film um bólkin*

# Herligur filmur um Dynamitt




**SØKKANDI** SKÚTAN VERÐUR **DRIGIN** UPP Á TURT Í NÝGGJUM **DOKUMENTARFILMI**, SUM ER **FRÍSKUR**, STUTTLIGUR OG **UNDIRHALDANDI**



**DOKUMENTAR**
**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Ein dagin ringdi telefonin hjá Niclas Hera Jákupsson. Tað var ikki omman við Gjógv, ið ringdi, men sangarin Karl Martin Samuelsen.

– Hann segði við meg, at hann hevði brúk fyri einum kóri til ein fótbóltssang, og kórið skuldi ikki syngja for reint. Hann spurdi meg, um vit í Dynamitt ikki kundu koma at syngja.

Hetta er ein av søgunum, sum tónleikararnir í Dynamitt siga frá í nýggjum dokumentarfilmi um bólkin. Filmurin er partur av útgávu, har eisini live-fløga við bólkinum er við.

Søgan um Dynamitt minnir nógv um søgurnar um aðrar føroyskar tónleikabólkar – teir byrja meira ella minni tilvildarliga millum vinfólk í onkrum kjalllara – men við tíðini er søgan um tann popputa bólkin úr Klaksvík meira serlig. Teir hava verið meira áhaldandi enn miðal føroyski tónleikabólkurin, hava givið fimm fløgur út og hava spælt stórar konsertir fyri túsundtals áhoyrarum.

Teir hava verið kallaðir ein søkkandi skúta við pillrotnari last, men teir hava yvirlivað tær lemjandi atfinningarnar – og fólk hava sungið við.

## Óformellur

Dokumentarfilmurin sigur eina stuttliga og fríska søgu um Dynamitt frá byrjan, tá ið vinmenninir Niclas Heri Jákupsson og Emil Gunnarstein keyptu ljóðføri fyri konfirmatiónspengarnar og stovnaðu bólk, hóast teir ikki dugdu at spæla, og fram til dagin í dag, nú Dynamitt er populerari, enn teir nakrantíð áður hava verið.

Tónin í filminum er óformellur og stuttligur. Niclas Heri og Emil undirhalda við søgum um bólkin. Millum annað, tá ið teir einaferð vóru á veg til Sands at spæla, men mistu hugin á veg suður. Teir ringdu avboð, men máttu finna upp á eina umbering fyri ikki at møta til dansin.

– Vit søgdu so, at bussurin hjá okkum var farin út av á Oyggjarvegnum, og at tveir av tónleikarunum vóru endaðir á Landssjúkrahúsinum.

Dynamitt hevur við nýggju útgávuni gjørt nakað, sum eingin annar bólkur hevur gjørt. Teir dokumentera sína søgu við filmi, og tað er kanska í tráð við heitið á útgávuni:

Vit vilja ongantíð doyggja.

## INNIHALD

4 SAMRØÐA: **KARINA OTTOSEN**
7 TIPS: **SMINKA TIL MYRKU TÍÐINA**
8 BAKGRUND: **HEILSUEFTIRLIT Á ARBEIÐSPLÁSSINUM**
10 10 TING UM **WAYNE ROONEY**
11 90 SEKUND: **JÓANNES JAKOBSEN**
14 TIL ARBEIÐIS: **ANNIKA FAY JOENSEN**
15 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
16 KRONIKK: **VÍÐGONGD MANNMINKAN ELLA ALTJÓÐA MANNARÆTTINDI**
18 HEILSUSÍÐAN: **MATPAKKAR**
19 MIÐLAMJARR: **TAÐ SIGA TEY Á FACEBOOK OG Í MIÐLUNUM**
23 TAÐ HENDIR: **KONSERTIR, TILTØK, BØKUR OG ANNAÐ**
24 VIKUMYNDIN: **STEINA Í INDIA**

## KLUMMAN



*Inna Törnroos*

# Fulltíðar-mamma við fulltíðar-starvi

»Hvat meina tey, tá tey siga, at eg eri vikuskiftis-mamma?«

Starvsfelagin rópar hart við døgurðaborðið!

Hon hevur júst lisið fyrsta partin í eini røð, ið hevur fingið heitið »At vera fulltíðarmamma«.

Greinin er um 28 ára gomlu Helenu, ið hevur valt at verða heima við børnunum, til tey byrja í skúla, og harvið valt at liva av eini løn, ongan bil at hava og ongar uttanlandsferðir at gera.

Starvsfelagin fær skjótt nógvar yvir á sína síðu. Heiti á greinarøðini provokerar okkum mammur, ið arbeiða og hava børnini í barnagarði. Við tí at verða mamma kemur eisini kenslan av at ongantíð verða nóg góð. Ein slík greinarøð er reint dynamitt fyri ta kensluna.

Heiltíðar mammur eru vit, hóast at vit arbeiða úti 6-8 tímar dagliga! Vit gera tað, ið kvinnurnar fyri okkum bardust fyri at sleppa – út at arbeiða, vinna egnan pening og gerast sjálvstøðugar.

Helena og hennara líkar eru sjálvandi vælkomnar at ganga heima, men fyri flestu kvinnur er tað ógjørligt av fíggjarligum ávum.

Eg hevði ikki hugsað mær at gingið heima við børnum. Eg havi verið heima eitt ár við hvørjum, og tað er nokk. Arbeiðið og tær avbjóðingarnar lokka, og børnini hava tað gott saman við javnaldrum í barnagarðinum.

Mamma mín gekk heima við okkum, til vit fóru í skúla. Eg eri sjálvandi glað fyri tíðina, og vónandi var mamma eisini glað og nøgd við sítt lív heima. Men eg hevði avgjørt ikki tikið skaða – heldur tvørturímóti – av at gingið nakrar tímar í barnagarði, áðrenn eg byrjaði í Sørvágsskúla.

Starvsfelagin rópar aftur hart – nú frá skrivstovuni: »Eg sendi eitt mótmæli til redaktørin«. Hon er ill! Kanska tí at hon stríðist dagliga við at fáa trý børn í skúla og barnagarð og at gjalda stóra húsalánið. Hon hevur gjørt sítt val útfrá tí støðu, hon er í. Og fulltíðarmamma – ja tað er hon so garantera!

VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Karina Ottosen / Mynd: © Bollwein